# E - og tónleikurin



**Ingi Samuelsen, blaðstjóri**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
- Ja, við klaveri. Vit fingu tað gott nokk ikki fyrr enn eg var stórur smádrongur og búgvin at sendast til undirvísing hjá Rigmor Restorff.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
- Klaver til húsbrúk og eitt sindur aftur við felagssangi. Dugi tey vanligastu gittargrebini eisini.

*Syngur tú undir brúsuni?*
- Tað kemur meira enn so fyri.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
- Ja, hvør hevur ikki tað? Eg doymdi um at vera David Byron (upprunaligi sangarin í Uriah Heep).

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
- Rættiliga nógv. Kundi ikki ímyndað mær eitt lív uttan tónleik.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
- Upp móti 300 fløgur man tað vera blivið til. Nakað tað sama av LP-plátum, sum eg tíverri ikki lurti eftir longur.

*Hvat er tín yndisfløga?*
- Eg havi nógvar. Ein, ið eg ongantíð blívi keddur av, er plátan hjá Airplay.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
- Onkra nazi-trash-fløgu.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
- Kom og dansa hjartanskæri skattur mín. Eg eri so troyttur av honum.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
- Haldi næstan, at eg kann standa inni fyri øllum. Men ein country/gospel-samling hjá Oak Ridge Boys er eitt sindur pínlig.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
- Brown Eyed Girl hjá Van Morrison.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
- Tað veldst um, hvørjum tú ert saman við. Er tað friðarligur hugni, so skal tað vera country ella fólkatónleikur. Skalt tú upp á sofuna og spæla luftgittar saman við vinmonnunum, so skal tað vera 70-ara rokkur, Queen til dømis.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
- Tað lati eg upp til Ova Olsen og Janus Mohr at gera av.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
- Talentleysur tónleikur.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
- Dance the Night Away hjá Mavericks til dømis.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
- Cotton Fields hjá Creedence ella Hey Jude hjá The Beatles. Eg minnist ikki hvør kom fyrst.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
- Nú arbeiða tit upp á meg. Eg havi bara verið við til at skriva ein.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
- Havi ikki hugsað um tað. Riggar tað við Bohemian Rapsody?

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
- Eg verði noyddur til at nevna ein heilan hóp, tí eg ikki kann taka eina ávísa fram um aðrar: Richie Blackmoore's Rainbow í Göteborg í 1984 ella 1985, tí tað var tann fyrsta mega-rock-konsertin, eg var til. Kundi eisini nevnt Bruce Springsteen í Ítróttarparkini 1988, Johnny Cash í Skovdalen, Aalborg, Toto í Europahallen, Aalborg, The Chieftains á Skråen, Aalborg, Barrage eisini á Skráen, Al Jarreau í Valbyhallen 1986, James Taylor í Musikhúsinum, Århus, Gary Moore á Midtfyns-festivalen 1990, Lars Lilholt á Skagenfestivalen 1988, Walter Trout á Kielgasten, Holstebro 1991, Level 42 í áarføri á Nibefestivalen 1999, The Brandos á Nibefestivalen 1995, Björn Afzelius í Norðurlanda-húsinum og Runrig í Ítróttar-høllini á Hálsi 2002.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
- Van Morrison og Tom Jones saman, so teir kundu sungið »Sometimes we cry« fyri mær.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Árni Gregersen, Bornholm, argr@tv2bornholm.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## ....hvørjum endar tað við?

Sorgarsøgan úr Svøríki, har uttanríkisráðharrin var myrd, rakar okkum hart her á Bornholm.

Svøríki liggur bert 50 minuttir við ferju burtur, og næstan hvørja ferð vit skulu ferðast inn á fastlandið, so ferðast vit gjøgnum Suðursvøríki.

Tað fær alt at kennast nærri. Vit kenna sviar og vit hitta teir javnan. Mangir teirra vitja okkum á Bornholm sum ferðafólk.

Sjálvur havi sjálvdan kent so stórt hjálparloysi, sum júst í hesum málinum. Sum eg síggi tað hiðani, so arbeiðir svenska løgreglan tung og seint - og ger so at siga onki fyri at fáa hjálp frá almenninginum í hesum máli.

Eg viðgangi, at eg eri litaður í míni áskoðan á svensku løgregluna. Havi í mong ár lisið svenskan krimilesnaða: Sjøval og Wahlø, Jan Guillou, Lisa Markland, Henning Mankell o.a.

Í øllum hesum lesnaði verður altíð av og á gjørt gjøldur burur úr løgregluni. Leiðslan er politisk og kappingin millum ymisku løgregluliðini er ofta so hørð, at tað gongur út yvir arbeiðið.

Nú skal eg so eisini gera vart við, at eg sjálvandi ikki byggi allar mínar metingar á svenskar krimibókmentir. Hyggja vit at svenska samfelagnum, so finnast har størri mótpolar enn í tí danska.

Sviar hava í mong, mong ár havt tungídnað. Ávísar ættir hava átt partabrøvini í hesum stóru, alheims fyritøkum. Munurin millum rík og fátæk er stórur, og tað ger eisini spenningarnar stórar.

Samanborið við Danmark er Svøríki eitt stórt land við mongum altjóða fyritøkum. Har finst vápna-, bil-, flog-, stál- og annar stórídnaður. Sviar hava altíð havt altjóða samband og hava sitið við borðini, tá ið stórar altjóða avgerðir hava verið tiknar.

Tað ger sjálvt samfelagið alt meira politiskt og sundurbýtt enn til dømis tað danska.

Morðið á Onnu Lindh fær okkum at hugsa um morðið á Olof Palme í 1986. Var sjálvur saman við Ragnar C. Joensen í SvF júst á Bornholm, tá ið Palme var skotin. Ongin er beinleiðis revsaður fyri ta hendingina enn. Christer Petterson hevur verið handtikin, men neyvan var tað hann, sum framdi drápið. Í Svøríki eru nógvar teoriir, og flestu halda, at løgreglan veit, hvør tað var, men at teir ikki hava haldgóð prógv.

Er tað sama støðan nú? Meðan eg skrivi hesi orðini situr ein 35 ára gamal maður í varðhaldi. Dómarin gekk við til at halda honum føstum í átta dagar, men tann løgfrøðisliga grundgevingin sigur, at illgrunin til mannin er veikur.

Eg veit nógv longu hava gjørt viðmerkingar til, at hendan sakin líkist Palme-sakini. Løgreglan virkar ikki serliga trygg og yvirbevísandi - og hví gongur so long tíð? Harragud - hetta hendi alt á aljósum degi - fólk mugu hava sæð, hvat hendi.

Fyristilli tykkum, at sama hending fór fram í SMS? Hevði tað borið til hjá einum brotsmanni at stungið onkran niður og so bara sloppið sær út?

Neyvan.

Kári Petersen spyr í einum av sínum yrkingum: ... hvørjum endar tað við? Fáa vit føroyingar ongantíð frið?

Umskrivað kundi ein spurt, um sviar ongantíð fáa frið.

Hægsta ynski má verða, at brotsmaðurin verður funnin og dømdur.

Og at ongin ivi er um prógvini.




Konfirmatións- klæðir til hansara



fáast í

Kallkyn Vágsbotnur Tel. 31 62 06





Hvør kann geva mær eitt gott heim?
9 vikur gamal kettlingur (hon) verður latin djóravini.

**Tlf. 455108**



Sunn og mjá við Herbalife byrja nú ...

Royn kosttilskotið ið:
• regulerar vektina
• bøtir um heilsuna
• gevur orku
fólk hava lætnað millum 2 og 70 kg.
- so eisini ber til hjá tær

Trupulleikar av appelsinhúð?




Ring og hoyr nærri
Tel 314175/ 214175
Kirsten
dveylan@post.olivant.fo
www.key4business.com



# Bøkur um missión

Í hesum døgum hevur New Tribes Mission ráðstevnu í Føroyum, har m.a. leiðarin fyri NTM Óli á Grømma Jacobsen luttekur. Nú um dagarnar legði George Verwer, leiðari fyri Operation Mobilisation, frá sær. Í hesum sambandi lýsa vit við hesum bókum:




George sigur m.a. í bókini, at Gud hevur tørv á fólki, ið tora at váða nakað í trúgv, sum veruliga trúgva, at Gud kann frelsa sjálvt har tað sær vónleyst út.




Er, saman við 'The Revolution of Love', eitt slag 'mission statement' hjá OM. Hunger for Reality er ein áheitan frá George til kristin um at gerast meiri verulig í kristinlívinum.




Bókin hjá Philip Yancey er umsett til danskt undir heitinum 'Den Jesus jeg ikke kendte'. Hesa bók hava vit til serprís 140,- Enska bókin kostar 90,-

Logos Bókasølan hevur stórt úrval av kristiligum bókum um familjuna, barnabøkur, ungdómsbøkur, kristna lívið, bøkur ið verja kristnu trúnna, umframt frálærutilfar. Eisini fáast tónleikafløgur og gávulutir.

Her eru vit




BÓKASØLAN logos

Bílegg bøkurnar á tel 312372
ella á www.logos.fo
teldupost: logos@logos.fo
**Opið: mán-frí: 14-18.**



zarepta

## Frá Zarepta

Heystlega fyri 14-17 ára gomul verður frá fríggjadegnum 10. til mikudagin 15. oktober 2003.

Legan kostar kr. 450,- (ferðagjald íroknað).

Tekning av leguluttakarum á Tlf. 282140 (frá kl. 17.00 - 21.00)

Starvsfólkatekning á tlf. 284040



FA. GRAVSTEINAR




Opi : m nadag - fr ggjadag 9 00 -17 00
annars samb rt avtalu.

V¿ruskr kann f ast!

Sj nband - 31 77 74



LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið "Nýggjur innkomuvegur til Havnar, 1. stig", við tilhoyrandi arbeiðsvegi frá Flatarvegnum, boðið út í almenna lisitatión.

Innkomuvegurin 1. stig, longd uml. 350 m, og arbeiðsvegurin longd uml. 220 m

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 30.september 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 9181-134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Lisitatiónin verður hjá Landsverkfrøðinginum, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, hósdagin 16. oktober 2003 kl. 14.00.

Adressa: Landsverkfrøðingurin, Tinghúsvegur 5, Postboks 78, 110 Tórshavn, Telefon 311333, Telefax 314986, Teldupostur eli@lv.fo

**LANDSVERKFRØÐINGURIN**



BILSKROKK
Lakkering & Plátuverkstaður



TLF. 32 24 71
Royn heimasíðu okkara á www.bilskrokk.fo



EYSTUROYINGAR

Nýtt teoriskeið byrjar hósdagin 25. september

Tilmelding hjá:
Hugo Kristiansen, tel. 225 225
Ole Lykke, tel. 220 972

Eysturoyar Teoriskúli

Sosialurin 341800



Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

Beinleiðis frá framleiðara

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820